ítróttur

Málleysur – tó spennandi

Serliga vágbingar kundu vera ónøgdir við bert at fáa annað stigið burtur úr dystinum á Sevmýri móti TB sunnudagin. Dystinum bilti tó einki, har var bæði lív og spenningur

1. deild. TB-VB 0-0

Grannauppgerðir hava altíð ein serligan karakter av, at nú ræður líkasum meira um at vinna, enn um onnur mótstøðulið eru á vøllinum.

Í so máta eru grannadystirnir millum TB og VB í Suðuroynni avgjørt eingi undantøk.

At kalla altíð er talan um sera spennandi og gjarna rættiliga vælspæladar dystir – helst eisini við einum dismi av dramatikki ella gott og væl tað.

Tann dramatikkurin, her verður hugsað um, vísti seg tó ikki so nógv sunnudagin, har bert eitt kort fall. Tað var gult, og Birgir Dimon hjá fekk tað, hóst Pól Thorsteinsson hjá VB kanska eins væl og betur hevði tað uppiborið.

VB mest at iðra seg um

Eftir ein slíkan dyst verður hann gjarna vendur og vigaður, og um tað varð gjørt hesaferð, so kundi niðurstøðan neyvan gerast onnur enn hon, at VB mundi hava mest at íðra seg um aftaná.

Sum dysturin byrjaði, var ikki serliga stórur munur á, og spælið var rættiliga javnt báðar vegir. Tó kundi verið meira ferð á, og spælið var eisini eitt sindur merkt av óneyvum avleveringum og kanska ov lítlari konsentratión.

Men sum dystur leið var tað VB, ið tók seg meira fram. Ein orsøk var kanska hon, at TB ongantíð fekk miðvøllin at virka eftir vild, og harvið heldur ikki fekk nóg gott spæl frameftir.

Kortini skal havast í huga, at VB-liðið hendan dagin var rakt meira av skaðum, enn gott er, um úrslit skal væntast burturúr. Spælarar sum Jóannes Jakobsen og Búi Dahl eru skaddir, og nú hevur liðið heldur ikki Jan Allan Müller við meira, so heldur tunnligt kann vera frammi í álopinum viðhvørt.

Har frammi roynist Egil Steintórsson tó bara væl, og hóast hann ikki fær vant meira enn aðruhvørja viku, er innsatsurin undir dysti.

Hinvegin byrjar tað spakuliga at gerast ein spurningur, um liðformaðurin á landsliðnum og venjarin hjá VB, Jóannes Jakobsen, megnar at vera í nóg góðari dystarvenjing til dyst landsliðsins í HM-undankappingini móti Wales 9. september. Dysturin sunnudagin var annar á rað, at Jóannes ikki er við á 1. liði hjá VB.

Vágbingar stríddust

Kortini stríddust VB'arnir so mikið væl, at teir í seinna hálvleiki høvdu munin og við eitt sindur meira hepni kundu sloppið avstað aftur við einum sigri upp á eitt ella tvey mál.

Men uttan mál kemur eingin sigur, og so varð eisini her. Hinvegin lá fleiri ferðir væl fyri hjá Vilmundi Michelsen, ið hevði einar tveir góðar kjansir, ið kundu slept allari luftini úr VB-ballónini, um teir vórðu realiseraðir.

Sum seinni hálvleikur leið, fall TB-spælið hinvegin bara meira og meira saman, so VB fekk fríari ræsur.

Hetta mundi eisini givið úrslit, tá hin ungi Pól Thorsteinsson helt ígjøgnum í høgru síðu , men ikki fekk skotið nærri, enn at tað streyk fram við stongini. Samstundis eitt av teimum fáu førunu, har TB-málverjin Rolf Sørensen ikki var heilt úti um seg, sum hann kanska átti.



Rolf Sørenen stóð sunnudagin ein sera góðan dyst í TB-málinum. **Mynd: Rógvi Johansen**

Rolf dagsins maður

Hann var nevniliga dagsins maður á liðnum hjá TB hendan dagin.

Serliga munnu áskoðararnir minnast, hvussu hann í tí eina førinum í fyrra hálvleiki tveitti seg flatan upp í tríkantin eftir skoti frá Rúna Nolsøe, ið skjeyt hart, staddur nakað innan fyri 16-m eturmarkið.

Sama gjørdi tó. Hvørki av liðunum kom nærri enn næstan og líkavið, og tað var bara ikki nóg mikið til, at meira enn eitt stig var hjá liðunum at býta ímillum sín.

TB er nú komið heilt undan niðurflytingarvanda, meðan VB enn hongur nakað niðarlaga við vandanum eftir sær. Hinvegin taldi hetta eina stigið sunnudagin fyri tvey, nú SÍF samstundis ikki megnaði meira enn javnleik móti HB.

hj.

Botnurin avgjørdur:

NSÍ er nú farið niður í 2. deild

»Nú fara vit at fyrireika okkum til næsta ár, og longu til næsta dyst vera fleiri broytingar at síggja á liðnum,« sigur venjarin Trygvi Mortensen

Sunnudagin var tann allarsíðsti kjansurin hjá NSÍ at vinna sær stig og varðveita vónina um framhalda í 1. deild – eisini komandi ár. Tapið móti gøtumonnum varð tó endin á hesi vón.

»Men vit hava ikki verið heilt óvitandi um, hvønn vegin, tað gekk, so vit eru fyrireikaðir, og nú hyggja vit framefturr,« sigur Trygvi Mortensen, venjari hjá NSÍ. »Nýggjar kreftir munnu fara at skapa eitt nýtt lið, og so er at vóna, at tí fer at gangast betur.«

Verður tú venjari eisini komandi ár?

»Nei, tað rokni eg ikki við,« sigur Trygvi. »Eg havi so í hvussu er ikki søkt starvið enn.«

Nú vera Sverri Justinussen, Jan Jørgensen og Henrik W. Joensen ikki við meira, so longu næsta dyst verður talan um broytingar á liðnum.

Ikki er greitt, hvat annað lið flytur niður, men ringast fyri er nú SÍF, ið hevur átta stig – 5 færri enn B36 og VB, nú bert fýra umfør eru eftir av landskappingini.

hj.

- sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin

Ja! Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.**

fyri kr. 205,- (haldarar í Føroyum)
fyri kr. 240,- (haldarar í Skandinaviu)

Goldið verður bert fyri bløðini restina av hesum ársfjórðinginum.

Okeypis Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____

tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Kannað postverkinum